# SANSIR SØKJA ROKNSKAPARLEIÐARA

Vilt tú vera við til at menna eina fyritøku, sum nú aftur stendur í vøkstri bæði í Føroyum og í Danmark?

Til komandi vøksturin er neyðugt, at Sansir fáa eina nýggja dygga fíggjarstýring. Hesa fíggjarstýring skalt tú vera við til at byggja upp saman við leiðslu og kt-leiðara.

Tú fært ábyrgdina av dagliga bókhaldinum (skuldarum og ognarum), at leggja fíggjarætlanir, at gera mánaðar- og ársroknskapir, at greiða lønarviðurskiftini hjá starvsfólkunum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú HD í roknskapi ella cand. merc.

Tú hevur hollan kunnleika til bókhald og roknskap, og tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Sansir eru ein samskiftisfyritøka við 20 starvsfólkum. P/F Sansir hava eitt dóttirfelag í Danmark, sum eitur Sansir Danmark A/S. Vit vænta vøkstur á føroyska og serliga danska marknaðinum komandi árini.

Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum verður við til at skapa framtíðina saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. september klokkan 10.00. Umsóknir skulu sendast við eposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga upplýs títt fartelefonnummar.

Sama dag ella næsta arbeiðsdag, sum tú sendir umsóknina, fært tú svar við váttan um, at vit hava móttikið hana.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr 555 353 ella Høgna Rasmussen á tel 555 351. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

SANSIR

www.sansir.fo










# Flúgv & sigl

Keyp Flúgv & Sigl frá 62°N Travel! Flúgv einvegis, og sigl hinvegin! Vit hjálpa tær við báðum pørtunum!

Prísur fyri hvønn, t/r ................ úr kr. 2.200,-

Íroknað prísinum er einvegis sigling við Norrönu, Føroyar-Esbjerg/Hanstholm, og einvegis flogferð Keypmannahavn – Føroyar við Atlantic Airways.

Gist verður í deildum fýrapersónakamari umborð á Norrönu. Um tú/tit ynskja annað kamar, ella vilja hava bil við, so rokna vit fegin ein nýggjan prís til tykkum. Eisini ber til at flúgva frá Reykjavík, Aalborg og Billund. Vit hjálpa eisini fegin, um tit ynskja at leiga bil.

**Tíðarskeið:**

21/8 - 10/9 2010
Prísur úr kr. 2.485,-

11/9 - 31/12 2010
Prísur úr kr. 2.200,-





62°N travel – so er ferðin byrjað!

Hoydalsvegur 17 · 100 Tórshavn
Tel: 34 00 00 · booking@62n.fo
www.62n.fo